1991>>>>>>>>>>>>>>>>>>>>>>>>>>2003

O.K. 12 ár

Opið hús 31. mai

31. mai 2003 Hevur O.K.Heilsøla & Maskinur FO 430 Hvalvík

12 ára føðingardag

Í hesum sambandi er handilin opin frá KL 9.00 til 18.00

Latið verður 20-30-40% í avsláttri av ávísum vørum.

Kaffi og rundstykkir v.m. Okkurt verður til børnini eisini

Vit fáa eisini vitjan av fleiri motorsúklum,um veðrið er til vildar

Sosialurin 341800

Krosstein www.krosstein.fo

Pf. Svend

Handilslærlingur

Hevur tú hug at útbúgva teg innan sølu av tilfari til hitaverk, sanitet, baðirúmsútbúnað og liknandi, hava vit í dag eitt læruplass leyst at søkja.

Tú kemur at arbeiða innan øll økir í søluliðnum í fyrtøkuni, so sum goymsluarbeiði, avgreiðsla og vegleiðing av kundum, útrokning av tilboðum og innkeyp við meira. Arbeiðstíðin er 8 - 17, umframt einstakar leygardagar.

Eftir lokna lærutíð eru góðir møguleikar fyri framhaldandi arbeiði. Eisini gevur henda útbúgvingin góðar møguleikar fyri viðarí útbúgving á mongum økjum.

Hevur tú FHS er lærutíðin 3 ár, og byrjunarlønin 6.176,90 kr. um mánaðin, og hevur tú HH er lærutíðin 2 ár, og byrjunarlønin 8.994,59 um mánaðin.

Nærri upplýsingar fáast við at ringja til okkara, og spyrja eftir Svend Krosstein.

Hevur hetta tín áhuga, so send okkum eina umsókn saman við prógvum og viðmælum. Næmingar ið taka prógv í summar, eru eisini vælkomnir at søkja.

P/F Svend Krosstein
Falkavegur 6
Postboks 3229
Fo-110 Tórshavn

VHS Alt tilfar til VATN - HITAVERK - SANITET - VENTILATIÓN

Sosialurin 341800

Falkavegur 6 · FO-110 Tórshavn
Tel. 34 46 00 · Fax. 34 46 01
E-mail: krosstein@krosstein.fo

GÍ-NSÍ 1-1 (0-1):

Gerðabýti í Gøtu

Enn einaferð spældu NSÍ og GÍ eina javna grannauppgerð, og heldur ikki hesaferð eydnaðist NSÍ at fáa fatur á øllum

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Fyri triðju ferð innan stutta tíð skuldu GÍ og NSÍ takast í grannauppgerðini. Hesa ferð var talan um landskappingardyst, og eftir samlaða tapið í steypakappingini var einki at ivast í, at runavíkingarnir hesa ferð høvdu nakað at hevna.

Og tað vóru eisini gestirnir, sum sýndu størra stríðsfúsnið fyrstu løtuna. Heilt skjótt høvdu teir lika sum skapt sær eitt gott trýst oman móti GÍ málinum, og fyri mong mundi tað hesa løtuna bara kennast sum ein spurningur um tíð, áðrenn eitt mál skuldi koma.

Serstakliga Sonni L. Petersen var nakrar ferðir nær við, men tað var tað úr verjuni, at málið kom, tá fyrsta korterið var farið. Jónstein Petersen vann sær frispark í vinstru, og tá Ian Højgaard sendi hetta innfyri, var Óli Hansen hægstur og stútaði gestirnar framum.

Tóku seg aftur

Kanska var tað ótilvitað, men eftir leiðslumálið tóku runavíkingarnir seg nakað væl longur aftur á vølin, og hetta gav sjálvandi gøtumonnum væl betri sømdir at spæla.

Og tó at tað ikki komu fleiri mál fyri steðgin, so var einki at ivast í, at runavíkingar nú partvíst spældu eftir hæli. Fleiri ferðir gjørdist talan um heilt vandamiklar atsóknir frá heimaliðnum, men í Jens Martini áttu runavíkingarnir ein góðan seinasta skansa.

Hevði spælið verið skiftandi fyrra umfarið, so var tað meira javnt býtt seinastu trý korterini. Báðir partar royndu av øllum alvi at fáa málið, sum antin kundi avgera ella bjarga dystinum, og nakrar ferðir stóð eisini á framman fyri málini bæði.

Tað kom tó bert eitt mál afturat. Undir einum GÍ álopi verður bólturin stútaður inn móti NSÍ brotsteiginum, og har var hondin hjá Messias á, og so var einki roks frá dómaranum. Brotsspark varð dømt, og hetta sendi leikandi venjarin, Krzystof Popczynski trygt í netið. Sami Krzystof hevði nakað seinni ein góðan møguleika at avgera dystin, men hesaferð var Jens Marti fyri honum sum køtturin, og eisini í hinum endanum mátti Jacek einar tvær ferðir prógva, at hann kann gerast sannur fongur hjá GÍ.

So toluligt

Altso gjørdist talan um javnleik í Gøtu, og samanumtikið, so man hetta vera eitt úrslit, sum báðir partar kunnu liva so toluliga væl við. Runavíkingar hava ongan tíð havt nakra lætta uppgávu í hesum dystum, og tí man eitt stig í sjálvum sær ikki vera heilt av leið.

Hjá GÍ høvdu trý stig sjálvandi merkt, at teir høvdu hildið fast um einsamalla oddasessin, men hinvegin man tað kennast hugaligt, at teir nú spakuliga eru um at fáa skaddu leikarar sínar aftur. Tað er einki at ivast í, at fyri stabilitetin restina av árinum er hetta av alstórum týdningi, og spurningurin er so bara, hvussu væl liðið er fyri, tá teir sunnudagin skulu til Havnar at spæla oddadyst móti HB.

Dysturin í tølum

GÍ-NSÍ 1-1 (0-1)
0-1: Óli Hansen
1-1: Krzystof Popczynksi (br.)

TYRLUTÆNASTAN
HJÁ ATLANTIC AIRWAYS

Tyrluflúgvingin
á hvítusunnu 2003

2. hvítusunnudag verður flogið sum sunnudag.
Sunnudagin 8. juni verður ikki flogið.

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel 34 10 80 · Faks 34 10 01 · tyrlan@atlantic.fo
www.atlantic.fo

SAVEN 352 355

Vikuskifti

Nr. 101 • leygardagur • 31. mai 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

Vegna verkfallið eru fýra síður av Vikuskiftinum prentaðar í Varpinum m.a. 6. partur av greinarøðini »Josef Stalin – eitt fimti ára minni«

Kletturin

Hann verður roknaður sum tað sterka og trygga. Kletturin, ið vit brúka sum ímyndina av tí, vit skulu byggja á, við og av, um vit halda okkum gera rætt. Og vit syngja um hann, tá hann er klovnaður og hevur tikið okkara trupulleikar á seg. Og vit brúka hann at vinna á. Skulu síga niður við honum ella klíva upp um hann. Hann hevur altíð verið har, og hann fer framvegis at standa har, eftir at vit ikki eru meira

GRUNDFESTI
Edvard Joensen

Vit síggja hann allastaðni rundan um okkum. Klettin, sum oyggjarnar eru bygdar av. Hann stingur fram her og har. Viðhvørt sum nakað stórbært, vit fegin vilja goyma. Og viðhvørt sum nakað, ið forðar fyri framburði okkara, og vit fegin vilja hava burtur. Men allastaðni er hann, um vit síggja hann ella ikki.

Hann er spríktur upp úr dýpinum í upphavinum. Hesin kletturin, sum tá var rennandi sevja. So heit, at ikki var verandi í nánd. Hann storknaði og varð til klettin, vit kenna í dag. Hevur ligið her síðan upprunan. Hevur broytt skap av veðri og vindi. Hevur latið vatnið skapað seg og farið við sær, sum tað nú hevur kunnað. Hetta bleyta tilfarið, sum sendandi er komið niður úr luftini ella oman brekkuna, og í hesi túsundtals árini hevur brýnt og fílað hendan sterka klettin. Hesa ímyndina av ævinleikanum, sum kortini hevur verið noydd at boyggja seg fyri hesum óskapiligu vatndropunum, sum bert eina løtu er komnir sleingjandi framvið og so horvnir aftur. Og kortini hava sett so djúp spor eftir seg, at tey sóust afur í tí æviga klettinum.

Men ikki er hann bara heilur, allur sum hann er. Kletturin. Her og har eru sprungur og rivur, sum gera gjótur og gjáir, so hvørt, máðað verður burturav. Gera skapilsi av ymsari útsjónd. So tað her líkist einum manni, og har einum djóri. Onkunstaðni er eitt høvd týðuligt at síggja móti luftini, og aðrastaðni situr ein gomul kona bogin fram yvir og lesur úr eini bók. Listaverkini eru mong, sum høgd eru í klettin frá skaparans hond, ið framvegis ótroyttilig arbeiðir hvønn dag.

Og so minnir hann okkum eisini á okkara egna sinnalag. Støðufastur og róligur, eins og hann eisini kann vera ágangandi og viðhvørt beinleiðis áloypandi.

Her og har koma illsinniherðindi sendandi oman gjøgnum líðirnar, tá okkurt berglopið hevur verið í erva. Hesi knappligu glepsini, sum fara sendandi um allar vegir.

Aðrastaðni síggja vit, hvusus hann í upprunanum er floymdur út gjøgnum rivurnar. Sinnið er líkasum farið út millum rivjabeinini og stendur sum soylur beint upp í luftina. Styðjandi hvørja aðra, so tær gerast veldugir hamrar. Hóast tær hvør einsærins eru smáar í náttúrunnar veldi.

Tær skapa mynstur í landslagnum. Summastaðni standa tær beint upp og niður og síggja út, sum bíða tær eftir at verða tiknar úr klettinum til eitthvørt bygningsverk, sum skal minna aftur á antikkar grikskar ella rómverskar bygningar.

Aðrastaðni eru tær meira livandi og mynda mestsum eitt páfuglavel ella hvønn skapning, vit nú kunnu ímynda okkum.

Og kletturin er grundin undir lívinum hjá mongum. Grasið, sum veksur á teimum líðum og flottum, sum støðast í brattanum. Er føði hjá ferføttum, djórum, eins og fuglurin mangan byggir sítt heim, júst í klettinum. Bæði uttan á og inni í rivum og sprungum.

Og øll okkara mentan og siðaarvur er grundaður á klettin. Allur vesturheimurin, og nógv afturat, byggir beinleiðs á ta fyrijáttan, at: »Tú ert Pætur (tað merkir klettur), og á hesum kletti vil eg grunda kirkju mína, og helheims portur skulu ikki fáa vald á henni.«

Og soleiðis fer kletturin altíð at standa sum tað æviga, sterka, sum vit trygt kunnu líta á. Hóast han klovnar og loypur her og har. Og hóast hann í onkrum illsinnisherðindi hevur spænt stórar súlur út millum rivjabeinini.